# Frágreiðing frá Barnaverndarstovu Føroya fyri árið 2018

## - grundað á hagtøl frá barnaverndartænastunum og Fosturforeldraskipanini

Barnaverndartænastan fyri Norðoyggjar

Barnaverndartænastan fyri Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu

Barnaverndartænastan við Skálafjørðin

Barnaverndartænastan í VEKS

Barnaverndartænastan í Vágum

Barnaverndartænastan í Tórshavnar kommunu

Barnaverndartænastan fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur

Barnaverndartænastan fyri Suðuroynna

Barnaverndarstova Føroya

# Innihald

1. HAGTØLINI OG BARNAVERNDARSTOVAN ........ 3
2. UPPBÝTIÐ Í BARNAVERNDARTÆNASTUR ........ 4
3. SKRÁSETING AV MÁLUM ........ 6
4. HVUSSU BYRJA BARNAVERNDARMÁLINI? ........ 9
5. FÍGGING – KOSTNAÐUR AV BARNAVERND ........ 14
6. FOSTURFORELDRASKIPANIN ........ 19

# 1. Hagtølini og Barnaverndarstovan

Barnaverndarøkið varð skipað av nýggjum 1. januar 2006, við tað at málsøkið var flutt frá landinum til kommunurnar at umsita. Við hesi umlegging fylgdi ein nýggj ábyrgd, sum kommunurnar í stóran mun hava tikið í samstørvum eftir einum felags leisti, sum tryggjar munagóð framtøk í teimum fyriskipanum, sum verða settar í verk. Um somu tíð, sum málsøkið varð yvirtikið, stovnaðu kommunurnar í felag Barnaverndarstovu Føroya, sum skal:

- arbeiða fyri at styrkja og samskipa barnaverndarøkið í landinum
- virka sum ráðgevi hjá landsstýrismanninum viðvíkjandi stevnumiðum á barnaverndarøkinum
- vegleiða og ráðgeva barnaverndartænastunum í almennum spurningum viðvíkjandi viðgerð av barnaverndarmálum
- veita barnaverndartænastunum undirvísing viðvíkjandi uppgávum teirra sambært barnaverndarlógini
- skipa og umsita fosturforeldraskipanina
- syrgja fyri menning á økinum
- savna saman og umsita hagtøl á økinum

Seinni hevur Barnaverndarstovan eisini fingið umsitingina av SSP-samstarvinum um hendi, eins og at hon stendur fyri virkseminum í Barnahúsinum

### *Endamálið við hagtølunum*
Síðan Barnaverndarstova Føroya varð sett á stovn, hevur verið arbeitt miðvíst við at fáa til vega hagtalstilfar.

Endamálið við innsavningini av hagtølum er at betra um grundarlagið fyri avgerðum á barnaverndarøkinum, umframt at geva leiðslunum, ið varða av barnaverndarøkinum í Føroyum, eina rættvísandi mynd av støðuni hjá einstøku barnaverndartænastunum. Taltilfarið, sum fæst burtur úr upplýsingunum, kann eisini nýtast sum grundarlag hjá kommununum, tá tær leggja sítt virksemi til rættis.

Sambært barnaverndarlógini hava allar barnaverndartænastur í landinum skyldu at lata upplýsingar um barnaverndarmál til Barnaverndarstovu Føroya. Hetta er ein umráðandi áseting, ið gevur Barnaverndarstovuni møguleika at fáa eina góða mynd av virkseminum kring landið, og hvussu hetta kann mennast og gerast enn dyggari.

### *Trygd*
Tað er av størsta týdningi, at hagtølini eru so eftirfarandi sum møguligt, og at skrásettu upplýsingarnar í barnaverndarmálum ikki koma óviðkomandi í hendi. Upplýsingarnar verða einans nýttir til hagtøl og vísindalig endamál. Tí er eisini stórur dentur lagdur á, at starvsfólkini í einstøku barnaverndartænastunum vísa umhugsni og ansni í sambandi við hagtalsarbeiðið.

### *Rættleiki*
Fyri at tryggja, at upplýsingarnar í hesi frágreiðing eru rættar, er hendan frágreiðing, eins og undanfarin ár, send øllum barnaverndartænastunum til ummælis, gjøgnumgongd og góðkenning, áðrenn hon er almannakunngjørd.

Barnaverndarstova Føroya, august 2019

Oddbjørg Balle, leiðari

## 2. Uppbýtið í barnaverndartænastur

Landið er býtt upp í 8 *barnverndartænastur*, sum er felagsheitið fyri barnaverndarnevnd og barnaverndarumsiting. 7 av teimum 8 barnaverndartænastunum arbeiða í samstarvsøkjum. Bert Tórshavnar kommuna hevur sína egnu barnaverndartænastu einsamøll.

Samstarvsøkini skulu sambært lógini skipast samsvarandi eindunum í lógini um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur. Samstarvsøkir kunnu samstarva um felags barnaverndarnevnd, og skulu samstarvsøkini tá vera samfeld landafrøðiliga ella samferðsluliga. Tó kann landsstýrismaðurin loyva, at fleiri barnaverndarnevndir verða skipaðar innan einstøku samstarvsøkini, treytað av, at tað í minsta lagi eru 3.000 íbúgvar fyri hvørja barnaverndarnevnd.



## *Uppbýtið í barnaverndatænastur í 2018*

| Barnaverndarøki | Kommunur |
|---|---|
| Barnaverndartænastan fyri Norðuroyggjar | **Fugloyar**<br>**Klaksvíkar**<br>**Kunoyar**<br>**Viðareiðis**<br>**Hvannasunds** |
| Barnaverndartænastan fyri Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu | **Eystur**<br>**Fuglafjarðar** |
| Barnaverndartænastan við Skálafjørðin | **Nes**<br>**Runavíkar**<br>**Sjóvar** |
| Barnaverndartænastan í VEKS | **Vestmanna**<br>**Eiðis**<br>**Kvívíkar**<br>**Sunda** |
| Barnaverndartænastan fyri Vága- og Sørvágs kommunur | **Vága**<br>**Sørvágs** |
| Barnaverndartænastan fyri Tórshavnar kommunu | **Tórshavnar** |
| Barnaverndartænastan fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur | **Skopunar**<br>**Sands**<br>**Skálavíkar**<br>**Húsavíkar**<br>**Skúvoyar** |
| Barnaverndartænasta fyri Suðuroynna | **Hvalbiar**<br>**Tvøroyrar**<br>**Fámjins**<br>**Hovs**<br>**Porkeris**<br>**Vágs**<br>**Sumbiar** |

# 3. Skráseting av málum

Við árslok 2018 vóru 822 barnaverndarmál virkin kring landið.

Barnaverndarmál eru í sjálvum sær ymisk, og munur er á, hvussu umfatandi einstøku barnaverndarmálini eru. Málini snúgva seg oftast um vanliga ráðgeving, men eisini kunnu meira álvarslig inntriv koma fyri, har talan er um børn, sum verða sett heiman móti viljanum hjá foreldrunum. Talan er tá um eina sonevnda umsorganaryvirtøku uttan samtykki.

Tað ber sostatt illa til, at samanbera støðuna hjá barnaverndartænastunum kring landið, einans út frá hvussu nógvum málum tær hava ábyrgd av. So hvørt vísa hagtølini tó ár um ár, hvørt talið av barnaverndarmálum broytist, og um fyriskipanirnar, ið barnaverndartænasturnar seta í verk, tæna sínum endamáli.

Hvørt barnið sær er skrásett sum eitt mál. Hetta merkir, at ein  familja kann vera skrásett sum fleiri barnaverndarmál, um fyriskipanir verða settar í verk fyri fleiri børn í somu familju.

## *Talva 1: Tal av barnaverndarmálum við árslok 2018*

| | Mál / gentur | | Mál / drein. | | Mál / bæði kyn | | | Barnatal í økinum | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **0-17** | **18-23** | **0-17** | **18-23** | **0-17** | **18-23** | **Tils.** | **0-17** | **18-23** | **Tils** | **%** |
| Norðoyggjar | 30 | - | 52 | 1 | 82 | 1 | **83** | 1.488 | 424 | **1.912** | 4,3 |
| Eysturk. | 22 | 3 | 23 | 2 | 45 | 5 | **50** | 938 | 269 | **1.207** | 4,1 |
| Skálafj. | 56 | 4 | 53 | 2 | 109 | 6 | **115** | 1.658 | 433 | **2.091** | 5,5 |
| VEKS | 33 | - | 36 | - | 69 | - | **69** | 1.095 | 262 | **1.357** | 5,1 |
| Vágar | 26 | 2 | 25 | - | 51 | 2 | **53** | 906 | 204 | **1.110** | 4,8 |
| Tórshavn | 151 | 8 | 167 | 12 | 318 | 20 | **338** | 5.470 | 1.396 | **6.866** | 4,9 |
| Sandoy | 15 | 1 | 11 | - | 26 | 1 | **27** | 279 | 81 | **360** | 7,5 |
| Suðuroy | 33 | 1 | 53 | - | 86 | 1 | **87** | 1.025 | 263 | **1.288** | 6,8 |
| Alt landið | 366 | 19 | 420 | 17 | 786 | 36 | **822** | **12.859** | **3.332** | **16.191** | **5,1** |

Talvan vísir, at barnaverndarmál í % av barnatalinum tilsamans er 5,1 fyri alt landið – sum er 0,3 prosent-stig lægri enn seinasta ár. Sum tað sæst, hevur Eysturkommuna og Fuglafjørður lutfallsliga fægst barnaverndarmál (4,3%), men eisini Norðoyggjar, Vágar og Tórshavn liggja undir miðaltalinum fyri alt landið.

Økini Sandoy, Surðuroy og Skálafjørðurin høvdu fleiri mál í mun til barnatalið í sínum øki, enn miðaltalið fyri alt landið.

### *Talva 2: Tal av barnaverndarmálum í % av barnatali við árslok 2018*

| | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Norðoyggjar | 5,6 | 4,9 | 5,3 | 4,3 |
| Eysturkomm. og Fuglafj. | 6,1 | 4,6 | 4,5 | 4,1 |
| Skálafjørðurin | 4,9 | 7,4 | 6,6 | 5,5 |
| VEKS | 5,5 | 4,0 | 4,7 | 5,1 |
| Vágar | 9,9 | 6,8 | 7,2 | 4,8 |
| Tórshavn | 4,6 | 4,4 | 4,6 | 4,9 |
| Sandoy | 8,3 | 6,2 | 6,7 | 7,5 |
| Suðuroy | 7,6 | 8,6 | 7,9 | 6,8 |
| | | | | |
| **Alt landið** | **5,6** | **5,6** | **5,4** | **5,1** |

### *Yvirlit yvir tal av barnaverndarmálumum 2009-2018*



*Yvirlit yvir barnaverndarmál í prosentum av barnatalinum 2014-2018*



# 4. Hvussu byrja barnaverndarmálini?

Barnaverndarlógin fevnir, sambært viðmerkingunum til lógina, um børn, ið liva undir viðurskiftum, sum kunnu skaða teirra heilsu og menning.

Við barnaverndarlógini ynskti lóggevarin, at barnaverndartænasturnar skuldu fáa møguleika at savna sína orku um tey børn í samfelagnum, sum hava tørv á stuðli og hjálp. Tí fevnir barnaverndarlógin ikki um trivnaðin hjá børnum í síni heild. Lógin fevnir heldur ikki um børn, ið bera brek, uttan so, at tey samstundis liva undir umstøðum, sum kunnu skaða teirra heilsu og menning.

Fyri at tryggja, at barnaverndartænasturnar fáa kunnleika um børn, sum liva undir viðurskiftum, ið ikki eru nøktandi, er *fráboðanarskylda* ásett í barnaverndarlógini.

Lógin sigur, at øll hava fráboðanarskyldu, men skilur tó millum vanliga borgaran, ið kann vera ónavngivin, og tann, sum í starvi sínum hevur við børn at gera. I seinna førinum er kravið, at fráboðanin skal verða navngivin. Í sambandi við endurskoðan av barnaverndarlógini, varð fráboðanarskyldan hjá fakfólki herd við virknaði frá 1. juli 2012. Fakfólk hava skyldu at boða barnaverndartænastuni frá, um so er, at tey hava kunnleika til, ella hava orsøk at halda, at viðurskifti eru, sum krevja, at komið verður uppí eftir lógini.

Ásett er somuleiðis í lógini, at barnaverndartænastan skal siga starvsfólki, sum hava boðað frá, hvørt fráboðanin er móttikin.

Um fráboðanarskylduna sigur Barnverndarlógin hetta:

“**§ 14.** Øll, sum í starvi sínum hava við børn at gera og sum í hesum sambandi fáa kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at viðurskifti eru, sum krevja, at komið verður uppí eftir hesi lóg, hava skyldu til navngivin at boða barnaverndartænastuni frá hesum. Fráboðanarskyldan sambært hesum stykki verður sett fram um ásetingarnar í øðrum lógum um tagnarskyldu í viðkomandi yrkjum.

*Stk. 2.* Tann, ið fær kunnleika til, at foreldur ella annar uppalari vanrøkir, meinslar ella misnýtir eitt barn, ella at barnið á annan hátt livir undir viðurskiftum, ið kunnu skaða tess sálarligu ella likamligu heilsu ella menning, hevur skyldu til at boða avvarðandi barnaverndartænastu frá hesum. Fráboðarin kann vera ónavngivin.

*Stk. 3.* Fráboðast skal eisini eftir stk. 1 og 2 um kvinnu, ið er við barn, tá ið mett verður, at tørvur er á stuðli sambært hesi lóg, t.d. vegna rúsevnismisnýtslu, sosialum ella sálarligum ávum.

*Stk. 4.* Barnaverndartænastan skal sum skjótast, og seinast innan eina viku, ganga ígjøgnum innkomnar fráboðanir og meta um, hvørt kanningar skulu setast í verk sambært hesi lóg, sí §§ 45 og 49.

*Stk. 5.* Barnaverndartænastan skal boða fráboðara sbrt. stk. 1 frá, hvørt fráboðanin er móttikin. Um ikki serlig viðurskifti tala ímóti hesum, skal barnaverndartænastan boða fráboðara sbrt. stk. 1 frá, hvørt fráboðanin hevur ført til, at málið verður kannað, ella at fyriskipanir eru settar í verk sambært hesi lóg. Afturboðanin fevnir bert um tann, ið fráboðað er um.

*Stk. 6.* Um ikki serlig viðurskifti tala ímóti hesum, kann barnaverndartænastan, tá tað hevur avgerandi týdning fyri, hvørja hjálp og stuðul fráboðari sbrt. stk. 1 kann veita barninum, kunna um, hvørjar fyriskipanir eru settar í verk.”

Sambært § 49, stk. 1 skal barnaverndartænastan tó *beinanvegin og innan 24 tímar* eftir eina fráboðan meta um, hvørt vandi er fyri barnsins heilsu og menning, og um bráðfeingis fyriskipan tí skal setast í verk.

Ein fráboðan sambært hesi grein nýtist ikki merkja, at nøkur fyriskipan verður sett í verk. Barnaverndartænastan kannar og upplýsir í fyrstu syftu málið, og um komið verður fram til, at tað ikki er grundarlag fyri at seta fyriskipanir í verk, skal barnaverndartænastan onki gera.

### *Talva 3: Nýggj barnaverndarmál í 2018 í mun til talið av børnum og ungum tilsamans*

| | Gentur | Dreingir | Tilsamans | 0-17 ár tilsamans | % av barnatali 2018 | 2017 | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðoyggjar | 19 | 27 | **46** | 1.488 | 3,1 | 3,5 | 3,3 | 2,0 |
| Eysturkomm. og Fuglafj. | 9 | 11 | **20** | 938 | 2,1 | 2,0 | 1,2 | 1,6 |
| Skálafjørðurin | 12 | 11 | **23** | 1.658 | 1,4 | 1,6 | 2,3 | 0,4 |
| VEKS | 12 | 13 | **25** | 1.095 | 2,3 | 1,9 | 3,0 | 2,7 |
| Vágar | 9 | 16 | **25** | 906 | 2,8 | 1,1 | 0,9 | 1,3 |
| Tórshavn | 35 | 45 | **80** | 5.470 | 1,5 | 1,4 | 1,2 | 1,3 |
| Sandoy | 9 | 3 | **12** | 279 | 4,3 | 1,7 | 1,6 | 2,8 |
| Suðuroy | 14 | 17 | **31** | 1.025 | 3,0 | 1,4 | 3,3 | 2,5 |
| | | | | | | | | |
| **Alt landið** | **119** | **143** | **262** | **12.859** | **2,0** | **1,7** | **1,5** | **0,8** |

Tilsamans vóru skrásett 262 nýggj mál í árinum – 119 gentur og 143 dreingir. Hetta er 41 mál fleiri enn árið fyri – ein vøkstur á 18,5%. Samlaða talið av nýggjum málum í mun til barnatalið í øllum landinum var 2,0%. Økini, sum hava havt størstu øking í nýggjum málum, eru Sandoy, Suðuroy, Vágar og VEKS. Hin vegin vóru færri nýggj mál stovnaði í Norðoyggjum og Skálafjørðinum.

### *Talva 4: Endað mál í 2018*

| | Gentur | Dreingir | Tilsamans | 0-22 tils. | Endað mál í % av barnatali |
|---|---|---|---|---|---|
| Norðoyggjar | 10 | 19 | **29** | **1.912** | 1,5 |
| Eysturkomm. og Fuglafj. | 2 | 4 | **6** | **1.207** | 0,5 |
| Skálafjørðurin | 23 | 28 | **51** | **2.091** | 2,4 |
| VEKS | 15 | 10 | **25** | **1.357** | 1,8 |
| Vágar | 21 | 17 | **38** | **1.110** | 3,4 |
| Tórshavn | 15 | 16 | **31** | **6.866** | 0,5 |
| Sandoy | 6 | 4 | **10** | **360** | 2,8 |
| Suðuroy | 5 | 8 | **13** | **1.288** | 1,0 |
| | | | | | |
| **Alt landið** | **97** | **106** | **203** | **16.191** | **1,3** |

## *Talva 5: Hvør boðaði frá í 2018*

| Fráboðari | Norður | Eystur | Skálafj. | VEKS | Vágar | Tórshavn | Sandoy | Suðuroy | Alt. | %-býti |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Foreldramyndugleikin | 1 | 3 | 2 | 8 | 4 | 20 | 5 | 7 | 50 | 12,32 |
| Foreldur u. foreldramyndugleika | 2 | 0 | 0 | 2 | 0 | 8 | 0 | 0 | 12 | 2,96 |
| Barnið sjálvt | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 | 2 | 0 | 0 | 3 | 0,74 |
| Skúli | 4 | 3 | 4 | 18 | 3 | 24 | 1 | 0 | 57 | 14,04 |
| Familja ella onnur, sum kenna familjuna | 8 | 1 | 5 | 10 | 4 | 7 | 0 | 2 | 37 | 9,11 |
| Dagstovnar, dagrøkt og frítíðarskúli | 4 | 4 | 1 | 5 | 8 | 17 | 1 | 1 | 41 | 10,10 |
| Løgreglan | 6 | 0 | 1 | 7 | 1 | 20 | 0 | 4 | 38 | 9,36 |
| Almannaverkið | 0 | 1 | 0 | 3 | 0 | 0 | 1 | 0 | 5 | 1,23 |
| Psyk. Depilin | 1 | 1 | 2 | 4 | 1 | 19 | 0 | 0 | 28 | 6,90 |
| Heilsufrøðingur | 1 | 3 | 2 | 6 | 1 | 13 | 1 | 2 | 28 | 6,90 |
| Kommunulækni | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 2 | 0 | 0 | 2 | 0,49 |
| Skaðastova | 0 | 0 | 0 | 2 | 0 | 0 | 0 | 0 | 2 | 0,49 |
| Ljósmóður | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 2 | 0 | 0 | 2 | 0,49 |
| Onnur í heilsuverkinum | 4 | 0 | 1 | 0 | 1 | 9 | 0 | 0 | 14 | 3,45 |
| Annað barnaverndarøki | 0 | 3 | 6 | 7 | 1 | 4 | 0 | 3 | 23 | 5,67 |
| Onnur, herímillum ónevnd | 12 | 0 | 1 | 9 | 3 | 28 | 2 | 0 | 52 | 12,81 |
| BVT tekur sjálv málið upp | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 8 | 1 | 0 | 9 | 2,22 |
| Sernám * | 1 | - | - | - | - | - | - | 1 | 2 | 0,49 |
| Sálarfrøðingar * | 1 | - | - | - | - | - | - | - | 1 | 0,25 |
| **Íalt** | **45** | **19** | **25** | **82** | **20** | **183** | **12** | **20** | **406** | **100,0** |

*) Lagt afturat av BVT

Ein fittur partur av teimum, sum fráboða eitt barnaverndarmál eru fólk, sum hava familjutilknýti til barnið, ella kanska barnið sjálvt.

Nógvar av fráboðanum koma tó frá yrkisliga umhvørvinum, sum barnið beinleiðis ella óbeinleiðis kemur í samband við. Tann yrkisbólkurin, sum fráboðar oftast, eru skúlarnir, ið standa fyri 14,04% av øllum fráboðanum. Eisin eru dagstovnar, dagrøkt og fríðarskúli væl umboðað í hesum bólki við 10,10%.

Í mun til seinasta ár, so er ein lækking úr 18,9% til 12,8% í bólkinum *Onnur*, sum eitt nú fevnir um tey, sum ynskja at vera ónevnd við síni fráboðan. Tá er talan um fólk, ið ikki boða frá sum fakfólk, men sum annars eru stúrin um støðuna hjá einum barni. Sí annars s. 9 um hetta.

Samlaða talið – 406 – samsvarar ikki heilt við samlaða talið í talvu 3. Orsøkin til hetta er, at talan kann vera um meira enn ein fráboðara í summum málum. Tvs. at hugsast kann t.d., at bæði skúli, løgregla og kommunulækni hevur boðað frá í eina og sama máli. Leggjast kann aftrat, at hetta talið var í fjør 302, so hetta er ein vøkstur á 34,4%.

## Barnið sum offur og hættislig atferð hjá barni

Skeivleikar, sum gera um seg í barnaumsorgan og uppaling, kunnu verða býttir í tveir flokkar: harðskap og vanrøkt. Við harðskap verður meint við gjørda gerð, sum kann skaða ella sannlíkt skaðar menninginga hjá barninum. Við vanrøkt verður meint við ógjørda gerð, sum kann skaða ella sannlíkt skaðar menningina hjá barninum.

## Talva 6: Hvørjar vóru orsøkirnar til fráboðanirnar í 2018

| | ALT LANDIÐ 2018 | %-BÝTI | 2017 | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Vanrøkt** | | | | | |
| Kenslulig/sálarlig vanrøkt | 152 | **26,3** | 87 | 135 | 93 |
| Vanrøkt í sambandi við umsjón og eftirlit | 157 | **27,1** | 73 | 64 | 52 |
| Vanrøkt í sambandi við skúlagongd | 33 | **5,7** | 17 | 19 | 19 |
| Likamlig vanrøkt | 22 | **3,8** | 12 | 16 | 6 |
| *Tilsamans* | *364* | | *189* | *234* | *170* |
| | | | | | |
| **Harðskapur** | | | | | |
| Kensluligur/sálarligur harðskapur | 29 | **5,0** | 16 | 18 | 17 |
| Likamligur harðskapur | 38 | **6,6** | 12 | 16 | 13 |
| Kynsligur harðskapur (ágangur) | 18 | **3,1** | 14 | 10 | 18 |
| *Tilsamans* | *85* | | *42* | *44* | *58* |
| | | | | | |
| **Heilsa ella lív hjá ófødda barninum í vanda** | | | 25 | 2 | 6 |
| *Tilsamans* | *4* | *0,7* | *25* | *2* | 6 |
| | | | | | |
| **Hættislig atferð hjá barninum** | | | | | |
| Barnið hevur trupulleikar í skúlanum ella vanrøkir skúlan | 27 | **4,7** | 41 | 35 | 33 |
| Misgerðir hjá barni | 11 | **1,9** | 33 | 20 | 8 |
| Barnið fremur likamligan ella kynsligan harðskap | 26 | **4,5** | 10 | 8 | 10 |
| Barnið setur egnu heilsu og menning í vanda | 45 | **7,8** | 25 | 31 | 14 |
| Barnið tekur rúsevni/rúsdrekka | 12 | **2,1** | 13 | 15 | 3 |
| Fíggjarstøða * | 5 | 0,9 | | | |
| *Tilsamans* | *126* | | *122* | *109* | *68* |
| | | | | | |
| **Orsøkir til fráboðanir tilsamans** | **579** | ***100,0*** | 376 | 389 | 302 |

*) Bert skrásett hjá einari BVT.

Gevið gætur, at til ber at skráseta meiri enn eina orsøk til fráboðan fyri hvørt mál.

*Misgerðir hjá barni* kunnu eitt nú vera: at tað ikki kemur til hús til ásettar tíðir, biddar, rýmir, brýtur inn og ger herverk. Við *likamligan ella kynsligan harðskap* verður bæði hugsað um ágang móti øðrum barni og móti vaksnum fólki.

## *Talva 7: Orsøkir til, at fyriskipanir endaðu í 2018*

| | Norður | Eystur | Skálafj. | VEKS | Vágar | Tórsh. | Sandoy | Suðuroy | Alt landið | %-býti |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Endamálið rokkið | 18 | 2 | 27 | 7 | 28 | 1 | 5 | 6 | **94** | 45,85 |
| Viðurskiftini í heiminum eru góðkend * | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 25 | 0 | 0 | **25** | 12,20 |
| Fyriskipan nyttuleys | 0 | 1 | 3 | 2 | 3 | 2 | 2 | 2 | **15** | 7,32 |
| Barnið er fylt 18 ár | 5 | 0 | 7 | 2 | 2 | 1 | 0 | 2 | **19** | 9,27 |
| Familjan flutt til annað barnaverndarøki | 5 | 1 | 13 | 9 | 3 | 0 | 0 | 0 | **31** | 15,12 |
| Familjan flutt av landinum | 0 | 1 | 0 | 5 | 0 | 2 | 2 | 0 | **10** | 4,88 |
| Víst til annan myndugleika | 1 | 1 | 1 | 0 | 2 | 2 | 1 | 3 | **11** | 5,37 |
| **Tilsamans** | **29** | **6** | **51** | **25** | **38** | **33** | **10** | **13** | **205** | **100,0** |

*) Bert skrásett hjá einari BVT.

Gevið gætur, at til ber at skráseta meiri enn eina orsøk til, at eitt mál verður endað.

## Yvirlit: hvør boðaði frá í 2018?



## 5. Fígging – kostnaður av barnavernd

Áðrenn barnaverndarlógin kom í gildi, var tað sambært barnaforsorgarlógini barnaverndarnevndirnar í einstøku kommununum, sum tóku avgerð í barnverndarmálum, og landið rindaði útreiðslurnar av málunum. Eitt av endamálunum við nýggju lógini var, at fáa greitt fíggjarligt ábyrgdarbýti millum land og kommunur á barnaverndarøkinum. Lógin ásetur tí, at kommunurnar bera kostnaðin av tí fyribyrgjandi partinum av barnverndarøkinum, og tá børn verða sett til fosturs, meðan landið ber útreiðslurnar, tá børn verða umsorgnaryvirtikin og fara á viðgerðarstovn. Kommunurnar rinda tó eitt ávíst brúkaragjald í hesum sambandi. Sí annars talvu 12.

### *Talva 8: Kostnaður av barnaverndarøkinum fyri hvønn íbúgva í 2018*

| | Fólkatal | Kostnaður tilsamans | Fyri hvønn íbúgva 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|---|
| Norðoyggjar | 6.140 | 7.490.359 | 1.219,93 | 1.012,97 |
| Eysturkomm. og Fuglafjørður | 3.671 | 4.260.000 | 1.160,45 | 973,10 |
| Skálafjørður | 6.432 | 10.291.000 | 1.599,97 | 1.654,61 |
| VEKS | 4.347 | 4.134.566 | 951,13 | 841,90 |
| Vágar | 3.289 | 7.314.000 | 2.223,78 | 2.253,01 |
| Tórshavn | 21.592 | 33.510.481 | 1.551,99 | 1.362,72 |
| Sandoy | 1.272 | 1.041.908 | 819,11 | 842 |
| Suðuroy | 4.593 | 5.460.777 | 1.188,93 | 1.180,27 |
| **Alt landið** | **51.336** | **73.503.092** | **1.431,80** | **1.311,39** |

Í 2018 kostaði barnaverndarøkið sostatt 73,5 mió. krónur fyri allar kommunurnar tilsamans, í mun til 66,2 mió. krónur í 2017.

Miðalkostnaðurin hækkaði eitt vet fyri hvønn íbúgva. Hann var 1.431,80 krónur í 2018, í mun til 1.311,39 krónur árið fyri. Sum tað sæst, lógu fleiri øki undir hesum miðaltali, meðan onnur øki lógu væl oman fyri.

Mestan kostnað fyri hvønn íbúgva hevði Barnaverndartænastan fyri Vága og Sørvágs kommunur (2.223,78 krónur) og Barnaverndartænastan við Skálafjørðin (1.599,97 krónur). Hetta er tó ein lækking í mun til í fjør, tá talið var ávíkavist 2.253,01 krónur og 1.654,61 krónur. Barnaverndartænastan í Sandoy og í VEKS-samstarvinum høvdu lægsta kostnaðin fyri hvønn íbúgva – ávikavist 819,11 krónur og 951,13 krónur.

### *Talva 9: Kostnaður av barnaverndarøkinum fyri hvørt mál í 2018*

| | Mál | Kostnaður tilsamans | Fyri hvørt mál |
|---|---|---|---|
| Norðoyggjar | 83 | 7.490.359,35 | 90.245,29 |
| Eysturkommuna og Fuglafjørður | 50 | 4.260.000,00 | 85.200,00 |
| Skálafjørður | 115 | 10.291.000,00 | 89.486,96 |
| VEKS | 69 | 4.134.566,79 | 59.921,26 |
| Vágar | 53 | 7.314.000,00 | 138.000,00 |
| Tórshavn | 338 | 33.510.481,00 | 99.143,43 |
| Sandoy | 27 | 1.041.908,62 | 38.589,21 |
| Suðuroy | 87 | 5.460.777,20 | 62.767,55 |
| | | | |
| **Alt landið** | **822** | **73.503.092,96** | **89.419,82** |

Í miðal kostaði hvørt barnaverndarmál sambært talvuni 89.419,82 krónur í 2018. Í Sandoynni, Suðuroynni, VEKS-samstarvinum, eins og í Eystur- og Fuglafjarðar kommunu, er miðalkostnaðurin fyri hvørt mál lægri enn landsmiðaltalið, meðan hann er hægri í Norðoyggjum, í Vágum, í Tórshavn og við Skálafjørðin.

### *Talva 10: Kostnaður av barnaverndarøkinum, býtt á nýtslu, í 2018*

| | Fosturf. | Stovnsútr. | § 15 fyrisk. | Fyris./starvsf. | Annað | Tils. 2018 | Tils. 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norður | 1.498.270 | 965.400 | 1.304.318 | 3.276.900 | 445.471 | 7.490.359 | 6.094.748 |
| Eystur | 1.207.158 | 731.517 | 896.611 | 1.357.873 | 66.841 | 4.260.000 | 3.529.455 |
| Skálafj. | 2.540.000 | 2.106.000 | 2.092.000 | 3.553.000 | 0 | 10.291.000 | 10.383.000 |
| VEKS | 480.432 | 1.032.000 | 446.796 | 1.967.743 | 207.595 | 4.134.567 | 3.616.778 |
| Vágar | 1.734.958 | 869.000 | 1.520.955 | 3.149.087 | 40.000 | 7.314.000 | 7.284.200 |
| Tórshavn | 13.365.677 | 2.810.790 | 8.888.889 | 8.445.125 | 0 | 33.510.481 | 28.790.337 |
| Sandoy | 132.809 | 0 | 491.827 | 417.273 | 0 | 1.041.909 | 1.083.694 |
| Suðuroy | 937.970 | 902.193 | 1.207.212 | 2.413.402 | 0 | 5.460.777 | 5.443.435 |
| | | | | | | | |
| **Alt landið** | 21.897.273 | 9.416.900 | 16.848.608 | 24.580.404 | 759.907 | **73.503.093** | **66.225.647** |

Talva 10 vísir kostnaðin av barnaverndarøkinum, býtt á nýtslu. Sum tað sæst, er *fyrisitingin* (og í summum økjum eisini *starvsfólk, sum eru sett í fast starv at geva viðgerð* (sí talvu 14), størsti útreiðslubólkurin. Síðan eru tær fyriskipanir, sum standast av børnum, ið verða sett heiman, størsta einstaka útreiðslan í fleiri av barnaverndarøkjunum, eins og fyri landið alt.

Fyrisitingarkostnaður fevnir um:

- kostnað fyri starvsfólk í barnaverndartænastunum,
- samsýning til barnaverndarnevndirnar og
- kostnað av rakstrinum av Barnaverndarstovu Føroya.

Støddin á samsýningini til fosturforeldur verður ásett í kunngerð frá Almannamálaráðnum við atliti at, hvussu krevjandi uppgávan er. Her verður millum annað tikið hædd fyri aldri á barni, og um fosturforeldrini kunnu hava annað arbeiði eisini.

*Stovnsútreiðslurnar* fevna í mestan mun um brúkaragjaldið, ið barnaverndartænasturnar gjalda fyri at hava børn búgvandi í stovni. Sí annars talvu 12.

Við í upphæddini til *§ 15-fyriskipanir* eru tald umlætting hjá fosturforeldrum sambært § 15, stk. 1, pkt. 7. Sí talvu 13.

### *Talva 11: Kostnaður av Fosturforeldraskipanini í 2018*

| **Fosturforeldrask.** | **Norður** | **Eystur** | **Skálafj.** | **VEKS** | **Vágar** | **Tórshavn** | **Sandoy** | **Suðuroy** | **Alt landið** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Samsýning til fosturforeldur | 990.993 | 875.838 | 1.338.000 | 348.118 | 842.136 | 8.203.130 | 45.430 | 473.572 | 13.117.217 |
| Vistarhald/klæðir | 175.989 | 247.798 | 507.000 | 112.035 | 365.369 | 2.508.576 | 60.740 | 249.961 | 4.227.468 |
| Stovns- og skúlagjøld til aðrar kommunur o.t. | 161.925 | 7.000 | 475.000 | 0 | 486.000 | 582.917 | 0 | 115.565 | 1.828.407 |
| Útreiðslur í sambandi við samveru | 77.895 | 6.226 | 181.000 | 0 | 3.000 | 558.373 | 0 | 35.653 | 862.147 |
| Stuðlandi fyriskipanir fyri børn til fosturs og foreldur teirra | 87.494 | 41.000 | 18.000 | 8.977 | 0 | 1.379.731 | 14.400 | 34.279 | 1.583.881 |
| Lummapeningur til barnið | 0 | 29.296 | 21.000 | 11.302 | 38.452 | 127.743 | 12.239 | 16.745 | 256.776 |
| Stovnan og útbúnaður | 3.974 | 0 | 0 | 0 | 0 | 5.202 | 0 | 12.196 | 21.372 |
| **Tilsamans** | **1.498.271** | **1.207.158** | **2.540.000** | **480.432** | **1.734.957** | **13.365.672** | **132.809** | **937.970** | **21.897.268** |

Ein stórur helmingur av útreiðslunum av fosturforeldraskipanini verður nýttur at samsýna fosturforeldrunum við. Harafturat verður rindað fyri vistarhald hjá barninum í fosturheiminum og til klæði.

Við tað, at barnið ofta gongur í øðrum skúla enn í heimakommununi, verður skúlagjald latið til kommuna, har fosturforeldrini búgva.

*Talva 12: Stovnsútreiðslur í 2018*

| **Stovnsútr.** | **Norður** | **Eystur** | **Skálafj.** | **VEKS** | **Vágar** | **Tórshavn** | **Sandoy** | **Suðuroy** | **Alt landið** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bú- og viðgerðarst., brúkaragjald | 645.215 | 372.389 | 1.746.000 | 657.600 | 789.000 | 2.554.232 | 0 | 357.568 | 7.122.004 |
| Eftirskúlar | 75.998 | 75.363 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 151.361 |
| Skúlagongd í Føroyum og barnaansinggj. | 182.949 | 7.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 189.949 |
| Stovnsútreiðslur uttanlands | 0 | 270.365 | 341.000 | 374.400 | 80.000 | 253.207 | | 228.534 | 1.547.506 |
| Sálarfrøðiligar kanningar/viðgerð | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Útreiðslur í sambandi við samveru | 61.238 | 6.400 | 19.000 | 0 | 0 | 3.351 | 0 | 16.092 | 106.081 |
| | | | | | | | | | |
| **Tilsamans** | **965.400** | **731.517** | **2.106.000** | **1.032.000** | **869.000** | **2.810.790** | **0** | **602.193** | **9.116.900** |

Ein sundurgreining av stovnsútreiðslunum vísir, at nógv tær størstu útreiðslurnar standast av brúkaragjaldi í sambandi við bú- og viðgerðarstovnar, meðan smærri prosentpartar fara til stovnsútreiðslur uttanlands og til eftirskúlar og aðra skúlagongd.

Kostnaðurin at senda børn á viðgerðarstovn er ein landsútreiðsla, men barnaverndartænasturnar rinda, sum nevnt frammanundan, eitt brúkaragjald, ið Almannamálaráðið ásetir árliga sambært kunngerð.

*Talva 13: BVL § 15 - fyribyrgjandi fyriskipanir. Kostnaður í 2018*

| **§ 15** | **Norður** | **Eystur** | **Skálafj.** | **VEKS** | **Vágar** | **Tórshavn** | **Sandoy** | **Suðuroy** | **Alt landið** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Familjuviðgerð ella líknandi stuðul | 190.187 | 238.050 | 415.000 | 50.000 | 421.000 | 2.445.125 | 14.000 | 177.200 | 3.950.562 |
| Stuðul í heiminum | 597.510 | 152.068 | 666.000 | 26.957 | 337.183 | 1.611.412 | 312.558 | 295.741 | 3.999.429 |
| Sálarfrøðilig hjálp | 85.035 | 339.200 | 589.000 | 260.438 | 501.771 | 1.591.792 | 41.400 | 290.500 | 3.699.136 |
| Sosialt ansingarpláss | 0 | 0 | 16.000 | 17.955 | 0 | 0 | 17.263 | 25.900 | 77.118 |
| Persónligur ráðgevi/stuðul til barnið | 3.216 | 116.643 | 272.000 | 0 | 0 | 986.701 | 6.774 | 235.925 | 1.621.258 |
| Umlætting | 268.078 | 0 | 79.000 | 91.447 | 239.423 | 1.802.070 | 99.832 | 19.482 | 2.599.331 |
| Arbeiðsroynd ella líknandi | 31.319 | 42.150 | 53.000 | 0 | 9.576 | 334.427 | 0 | 31.447 | 501.919 |
| Sjúku-/misnýtsluviðgerð | 88.987 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 126.790 | 215.777 |
| Menna frítíðarvirksemi hjá barninum | 39.987 | 8.500 | 2.000 | 0 | 0 | 63.760 | 0 | 1.400 | 115.647 |
| Stuðul í egnum kamari/íbúð | 0 | 0 | 0 | 0 | 12.000 | 53.600 | 0 | 2.827 | 68.427 |
| **Tilsamans** | **1.304.318** | **896.611** | **2.092.000** | **446.796** | **1.520.953** | **8.888.887** | **491.827** | **1.207.212** | **16.848.604** |

Talvan vísir, at størstu útreiðslupostarnir eru til familjuviðgerð, persónligan stuðul til barnið, sálarfrøðiliga hjálp, eins og til stuðul í heiminum. Hesar fýra fyriskipanir sambært § 15 í barnaverndarlógini standa tilsamans fyri trimum fjórðingum av útreiðslunum, sum verða latnar eftir lógargreinini. Møguleikarnir at veita børnum og familjum hjálp eftir barnaverndarlógini eru nógvir. Á talvuni sæst yvirlit yvir ymiskar fyriskipanir. Høvuðsreglan er, at so leingi tað gagnar barninum, so er grundarlag fyri eini fyriskipan.

Fyribyrgjandi fyriskipanirnar sambært § 15 í barnaverndarlógini er vanliga størsti parturin av barnaverndar-arbeiðinum. Einans tá tað ikki er møguligt við fyribyrgjandi fyriskipanunum at geva einum barni ella familju nøktandi hjálp, kann verða farið víðari til aðrar og meira víðgongdar fyriskipanir. Slíkar fyriskipanir kunnu m.a. verða at seta barnið heiman í fosturheim ella á stovn. Flestu avgerðir, um at flyta barnið úr heiminum, verða tiknar við samtykki frá foreldrunum. Hóast samtykki er fingið til vega, skal málið leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan. Hetta er fyrst og fremst orsakað av, at tað við nýggju barnaverndarlógini varð mett neyðugt at styrkja rættartrygdina hjá børnum og foreldrum.

*Talva 14: Kostnaður av fyrisiting og viðgerð í 2018*

| | **Málsviðgerð** | **Viðgerð av børnum og avvarðandi** | **Tilsamans** |
|---|---|---|---|
| Norðoyggjar | 2.435.081,55 | 841.818,87 | 3.276.900,42 |
| Eystur | 814.724,00 | 543.149,00 | 1.357.873,00 |
| Skálafj. | 2.979.000,00 | 574.000,00 | 3.553.000,00 |
| VEKS | 1.967.743,11 | 0,00 | 1.967.743,11 |
| Vágar | 3.094.087,00 | 55.000,00 | 3.149.087,00 |
| Tórshavn | 8.534.735,00 | 2.992.863,00 | 11.527.598,00 |
| Sandoy | 417.273,00 | 0,00 | 417.273,00 |
| Suðuroy | 2.217.311,90 | 196.090,50 | 2.413.402,40 |
| **Alt landið** | **22.459.955,56** | **5.202.921,37** | **27.662.876,93** |

# 6. Fosturforeldraskipanin

Kommunurnar stovnsettu eina fosturforeldraskipan fyri alt landið, tá tær settu Barnaverndarstovu Føroya á stovn í 2006. Fosturforeldraskipanin er ein týðandi partur av virkseminum á Barnaverndarstovuni.

Tá umstøðurnar í heiminum eru soleiðis, at tað ikki ber til hjá einum barni at verða búgvandi heima, verður kannað, um barnið kann setast í eina fosturfamilju. Havt eigur at verða í huga, í hvørjum einstøkum føri, um næstrafólk kunnu góðkennast sum fosturfamilja.

Eitt fosturheim er sambært barnaverndarlógini at skilja sum eitt heim, har fosturforeldur hava umsorgan fyri einum barni í styttri ella longri tíðarskeið, tá ið tað verður sett heiman. Talan kann m.a. vera um umlætting, bráðfeingis fosturheim og fosturheim, har børn verða sett fyribils ella varandi til fosturs.

Krøvini til fosturfamiljur vóru frá 1. juli 2012 broytt soleiðis, at næstringar ella onnur, ið hava tætt samband við barnið, kunnu góðkennast sum fosturforeldur, um tey í ítøkiliga førinum eru egnað í mun til ávísa barnið. Sostatt eru ikki heilt somu krøv galdandi til hesi fosturforeldur sum til onnur.

Eitt barn kann setast til fosturs, tá ið:

1) foreldrini samtykkja, at barnið verður sett í fosturheim,
2) barnið ongan verja hevur,
3) barnið fyribils er undir barnaverndarnevndarinnar umsorgan uttan foreldranna samtykki.

Fosturforeldraskipanin á Barnaverndarstovu Føroya fær upplýsingar frá barnaverndartænastunum um barnið, og hvønn tørv barnið hevur, og skal so finna ta røttu familjuna til barnið.

Við ársenda í 2018 vóru 95 góðkendar fosturfamiljur í Fosturforeldraskipanini, sum høvdu børn til fosturs ella umlætting, ella sum vóru tilreiðar at taka ímóti børnum til fosturs ella umlætting. Av hesum 95 fosturfamiljunum vóru tær 38 í familju við barnið, ella ein partur av umhvørvinum hjá tí.

Umráðandi er at finna tey fosturforeldrini, sum hóska best til tað einstaka barnið. Tískil kemur fyri, at nakrar fosturfamiljur eru í skipanini, sum onkuntíð ikki hava børn. Tað kunnu vera ymisk viðurskifti, sum gera, at tað einstaka barnið ikki hóskar til hesar fosturfamiljur.

Eisini eru summar fosturfamiljur, sum verða nýttar til fleiri fyriskipanir. Til dømis, tá talan er um systkin, ella tá tað snýr seg um umlættingarfamiljur, sum hava fleiri børn í styttri tíðarskeið í senn.

Í 2018 komu 11 nýggjar umsóknir inn til Fosturforeldraskipanina, um at gerast fosturfamilja. Av teimum vóru 7 næstringar ella onnur, sum frammanundan eru partar av umhvørvinum hjá barninum.

### *Talva 15: Tal av børnum til fosturs 31. desember 2018 – býtt eftir aldri og kyni*

| | Gentur 0-6 | Dreingir 0-6 | Gentur 7-13 | Dreingir 7-13 | Gentur 14-17 | Dreingir 14-17 | Gentur 18-23 | Dreingir 18-23 | Gentur tils. | Dreingir tils. | Íalt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norður | 0 | 1 | 1 | 2 | 0 | 1 | 0 | 0 | 1 | 4 | **5** |
| Eystur | 0 | 0 | 2 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 2 | 1 | **3** |
| Skálafj. | 1 | 1 | 1 | 2 | 0 | 0 | 2 | 0 | 4 | 3 | **7** |
| VEKS | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 | 0 | 1 | 1 | **2** |
| Vágar | 0 | 0 | 2 | 0 | 2 | 0 | 1 | 0 | 5 | 0 | **5** |
| Tórshavn | 5 | 5 | 6 | 13 | 0 | 6 | 0 | 7 | 11 | 31 | **42** |
| Sandoy | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 | 1 | 0 | **1** |
| Suðuroy | 0 | 0 | 1 | 2 | 0 | 1 | 0 | 0 | 1 | 3 | **4** |
| **Alt landið** | **7** | **7** | **13** | **20** | **2** | **9** | **4** | **7** | **26** | **43** | **69** |

Tilsamans 69 børn vóru til fosturs í Føroyum við árslok 2018. Av hesum var størsti parturin úr Tórshavnar kommunu. Ein vaksandi partur av børnunum eru til fosturs hjá fólki, sum eru í familju við barnið ella á annan hátt eru partur av netverkinum hjá barninum.

Býtið millum dreingir og gentur, sum eru sett til fosturs við árslok 2018, vísir eina yvirvág av dreingjum fyri alt landið, nevnliga 43 dreingir og 26 gentur. Tá talan er um smá børn (0-6 ár) er kynsbýtið javnt.

### *Umlætting*

Tá ið viðurskiftini í heiminum ella hjá børnunum eru soleiðis, at ikki er neyðugt at seta tey til fosturs, men tey kortini hava tørv á umlætting, kunnu børnini koma í eina fosturfamilju til umlætting. Hetta merkir, at tey í styttri tíðarskeið búgva hjá fosturfamiljuni, men eru ikki umsorganaryvirtikin, og foreldrini hava framvegis foreldramyndugleikan og ábyrgdina av børnunum.

Mest vanligt er, at børnini eru eitt ella tvey vikuskifti um mánaðin til umlætting, men talan kann eisini verða um eitt ávíst tíðarskeið, meðan foreldrini eitt nú fáa viðgerð fyri misnýtslu o.l.

Ætlanin við umlætting er, at geva børnum og foreldrum nýggja orku. Koma børnini frá eini familju, sum ikki er so vælvirkandi á øllum økjum, kunnu tey síggja og kenna seg sum part av eini vælvirkandi familju, sum kann geva teimum umsorgan og upplivingar. Tað kann vera trupult at finna fosturfamiljur til umlættingarfyriskipanir. Hetta er eitt orku- og tíðarkrevjandi arbeiði fyri fosturforeldraskipanina. Tað, at finna eina fosturfamilju til eitt barn, sum skal í umlætting, kann ofta hava við sær, at fosturforeldraskipanin skal vitja fleiri fosturfamiljur, áðrenn rætta fosturfamiljan verður funnin.

Umlætting er ein sjálvboðin fyribyrgjandi fyriskipan, skilt á tann hátt, at barnið ella familjan kann broyta meining eftir, at fosturfamiljan er funnin og ikki ynskja umlætting kortini. Møguligt er ikki at seta í verk umlætting uttan samtykki frá tí foreldrinum, sum hevur foreldramyndugleikan.

### *Talva 16: Tal av børnum til umlætting í 2018 – býtt eftir aldri og kyni*

| | Gentur 0-6 | Dreingir 0-6 | Gentur 7-13 | Dreingir 7-13 | Gentur 14-17 | Dreingir 14-17 | Gentur 18-23 | Dreingir 18-23 | Gentur tils. | Dreingir tils. | Íalt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norður | 0 | 2 | 1 | 2 | 0 | 1 | 0 | 0 | 1 | 5 | **6** |
| Eystur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | **0** |
| Skálafj. | 2 | 1 | 1 | 3 | 0 | 0 | 0 | 0 | 3 | 4 | **7** |
| VEKS | 0 | 2 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 2 | **2** |
| Vágar | 0 | 0 | 0 | 2 | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | 3 | **3** |
| Tórshavn | 7 | 7 | 4 | 11 | 0 | 3 | 0 | 0 | 11 | 21 | **32** |
| Sandoy | 0 | 0 | 2 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 2 | 0 | **2** |
| Suðuroy | 0 | 0 | 1 | 2 | 0 | 0 | 1 | 0 | 2 | 2 | **4** |
| **Alt landið** | **9** | **12** | **9** | **20** | **0** | **5** | **1** | **0** | **19** | **37** | **56** |

Best umboðaði aldursbólkur í 2018 var 7-13 ára gomul. Eisini í 2018 vóru munandi fleiri dreingir enn gentur til umlætting. Barnaverndartænastan fyri Tórshavnar kommunu hevur nógv flest børn í umlætting, meðan aðrar barnaverndartænastur bert høvdu fá børn – ella onki, til umlættingar í 2018.

### Yvirlit: Kynsbýtið millum børn til fosturs í 2018




### Yvirlit: Kynsbýtið millum børn í umlætting í 2018

